## VEÐRIÐ




**Veðrið mikudagin – skírisaftan**
Mest skýggjað og eitt skifti helst regn. Vindferðin um 5 m/s av landsynningi og landnyrðingi. Út á dagin snarar hann í ein útnyrðing og veksur til 8 til 11 m/s. Tað verður ælaveður, lutvíst sum heglingur. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin – skírisdag**
Ælaveður við sól av og á. Vestanvindur, 5 til 10 m/s, sum so líðandi minkar. Hitin um dagin um 5 stig, um náttina millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin – langafríggjadag**
Turrveður við sólarglottum. Vindur av útsynningi, 3 til 8 m/s , og hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin – páskaaftan**
Skýggjað og so líðandi regn. Sunnanvindur, 5 til 10 m/s, og hitin millum 4 og 8 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Fekk silvuroyrnaringar sum tøkk fyri hjálp«

**Maud Sigurðsdóttir Simonsen býr í Italia saman við manni og dóttir síni, men í løtuni starvast hon í móttøkuni umborð á Norrönu.**

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

**■ Hví flutti tú til Italia?**
– Maður mín er italienari og hevur búð í Føroyum seinastu sjey árini, so eg helt, at eg nú átti at fara til hansara heimland at búgva í eina tíð. Í Italia arbeiði eg umvegis alnetið fyri Skeiðsdepilin hjá Handilsskúlanum og Tekniska Skúlanum. Men tá eg fyri kortum fekk boðið at koma umborð aftur á Norröna at arbeiða, tók eg alt fyri eitt av.

**■ Hvussu dámar tær arbeiðið?**
– Tað er spennandi, og her hendir altíð okkurt nýtt. Hvønn dag hitti eg eina rúgvu av fólkum úr ymiskum tjóðum, ið seta mær alskyns spurningar – alt frá einum so banalum spurningi sum: 'Hvar á bátinum er Bingo?' og til: 'Hvussu er vallaraheimið í Norra?'.

**■ Hvat er týdningarmikið at duga í tínum arbeiði?**
– Avgjørt at halda høvdið kalt í stressaðum støðum. Eitt nú er tað sera stressandi at standa innan fyri diskin framman fyri 50 fólkum, ið øll hava hvør sín trupulleika. Nógv eru óð og klaga, og tá er tað mín uppgáva at loysa trupulleikarnar.

**■ Sermerkt uppliving?**
– Í síðstu viku var eitt gamalt íslendskt par umborð. Konan varð brádliga sera sjúk, og maður hennara kom til mín og bað um hjálp. Eg ringdi alt fyri eitt til stýrimannin, ið síðan hjálpti konuni, ið skjótt varð betur fyri. Seinni kom maðurin aftur til mín við eini gávu. Eg fekk einar vakrar silvuroyrnaringar úr Hetlandi. Eg gjørdist sera rørd, hóast tað rætt og slætt ikki var eg, ið hevði gjørt so nógv fyri tey.

**■ Hvat gert tú, tá tú ikki ert til arbeiðis?**
– Onkuntíð eri eg so troytt, at eg sovi í 11 tímar út í eitt. Annars siti eg saman við hinum starvsfólkunum og hugni mær – spæli kort, hyggi í sjónvarp o.t. Tá eg orki, royni eg eisini at arbeiða fyri Skeiðsdepilin.



*Maud Sigurðsdóttir dámar væl at arbeiða umborð á Norrønu, men leingist heim.*

**■ Er tað trupult at vera burtur frá familjuni?**
Ja, avgjørt! Eg royni at ringja til dóttir mína tvær ferðir um vikuna, men vit hava brúk fyri pengunum, so soleiðis má tað bara vera.

**■ Hvørjum vilt tú heilsa?**
– Allari familjuni hjá mær, sum eg ikki havi sæð í eina tíð. Eisini vil eg senda eina serliga heilsu til systur mína, Katrin, ið býr í Danmark.

**■ Fært tú sjóverk?**
– Nei. Seinast vit fóru til Íslands rullaði tað sera illa, so tá varð eg eitt sindur úss. Men tá løgu flestu ferðafólkini á kamarinum, so tómligt var framman fyri móttøkuna.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 9 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 18 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Veðurvánirnar**
Eitt lágtrýst, 975 hPa við Ísland ferðast eystureftir, og køld luft við ælaveðri streymar inn yvir Føroyar av vestri og útsynningi. Eitt lágtrýst, 995 hPa sunnanfyri Kappan ferðast eystureftir og dýpist spakuliga.




**Veðurvánirnar til mikudagin á middegi:**
Skiftandi skýloft við ælaveðri. Vindur av útsynningi og vestri, um 8 m/s, í nátt veksur hann vindin nakað. Fyrrapartin í morgin skýggjað, men mest turrveður, nakað av vindi úr ymsum ættum. Hitin millum 4-8 stig.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 9/4 kl. 06[00]– 10/4. 06[00]. Hitin í gjár: 2,2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 9/4 kl. 06[00]– 10/4 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 29,3 mm

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. apríl | 06.08 | 18.24 | 05.08 | 17.24 | 05.23 | 17.39 | 08.08 | 20.24 | 09.08 | 21.24 | 04.23 | 16.39 | 03.23 | 15.39 | 06.23 | 18.39 | 07.23 | 19.39 | 05.53 | 18.09 | 07.08 | 19.24 |
| 12. Apríl | 06.37 | 18.55 | 05.37 | 17.55 | 05.52 | 18.10 | 08.37 | 20.55 | 09.37 | 21.55 | 04.52 | 17.10 | 03.52 | 16.10 | 06.52 | 19.10 | 07.52 | 20.10 | 06.22 | 18.40 | 07.37 | 19.55 |
| 13. Apríl | 07.13 | 19.32 | 06.13 | 18.32 | 06.28 | 18.47 | 09.13 | 21.32 | 10.13 | 22.32 | 05.28 | 17.47 | 04.28 | 16.47 | 07.28 | 19.47 | 08.28 | 20.47 | 06.58 | 19.17 | 08.13 | 20.32 |
| 14. Apríl | 07.51 | 20.11 | 06.51 | 19.11 | 07.06 | 19.26 | 09.51 | 22.11 | 10.51 | 23.11 | 06.06 | 18.26 | 05.06 | 17.26 | 08.06 | 20.26 | 09.06 | 21.26 | 07.36 | 19.56 | 08.51 | 21.11 |
| 15. Apríl | 08.31 | 20.52 | 07.31 | 19.52 | 07.46 | 20.07 | 10.31 | 22.52 | 11.31 | 23.52 | 06.46 | 19.07 | 05.46 | 18.07 | 08.46 | 21.07 | 09.46 | 22.07 | 08.16 | 20.37 | 09.31 | 21.52 |




**Vika 14 – 8. apríl**
Vinnaratøl: **05 - 10 - 18 - 22 - 30 - 32 - 34**
Eykatøl: **03 - 35**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | **4.828.740,- kr.** |
| 6 vinnarat.+ eykatal: | **75.609,- kr.** |
| 6 vinnaratøl | **3.461,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **145,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **44,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**Vika 13 – 1. apríl**
Jokaratal: **4 - 8 - 9 - 4 - 7 - 1 - 4**

| | |
|---|---|
| Øll 7 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |
| 6 aftastu røtt: | **198.804,- Kr.** |
| 5 aftastu røtt: | **24.876,- kr.** |
| 4 aftastu røtt: | **2.263,- kr.** |
| 3 aftastu røtt: | **236 ,- kr.** |
| 2 aftastu røtt: | **50,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum




**Vika 13 – 2. apríl**
1. Centrum:
**15 - 29 - 57 - 05 - 63 - 60 - 28 - 71 - 75 - 61 - 21 - 54 - 30 - 74 - 70 - 14- 34 - 17**
1. Ramme:
**35 - 25 - 68 - 13 - 45 - 33 - 02 - 27 - 39 - 59 - 12 - 46 - 66 - 41 - 55 - 50 - 48 - 72**
Fuld plade:
**26 - 65 - 36 - 40 - 07 - 10 - 43 - 47 - 38 - 03**
Fri spil: **B_X_N**

| | |
|---|---|
| Fuld plade: 1. pr. | **145.098,- kr.** |
| 1. Ramme: 2. pr. | **25.041,- kr.** |
| 1. Centrum: 3. pr. | **6.282,- kr.** |
| Ramme: 4. pr. | **464,- kr.** |
| Centrum: 5. pr. | **28,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**Fjeppari?**
**Les um ítrótt í Sosialinum**



5 707265 100036 >